# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ása Turið Niclasen** fer til gravar mikudagin kl. 15 úr kirkjugarðskapellinum í Hafnafirði. Tey, ið vilja minnast Ásu Turið, kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik banka.

**Petur Clementsen**, vanliga nevndur Petur á Sandi, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnumorgunin, 77 ára gamal. Kistan fer av Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 15. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 13.30.

Kistan við **Paula Joensen** fer úr kapellinum týskvøldið kl. 18.30. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13 úr Betesta. Tey, ið vilja minnast Paula Joensen kunnu lata eina peningagávu til Akurin.

**Sjúrður Skála, Tórshavn**, fer til gravar úr Kirkjugarðskapellinum týsdagin 2. desember kl. 14.

**Jóhan Hammer**, ættaður úr Gøtu, búsitandi Vartdal i Noregi, andaðist hóskvøldið, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin úr kirkjuni í Vartdal.

**Helga Johannesen av Sandi** andaðist 28. november, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Helga Danielsen**
Sørvágur

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til prestar, kirkjutænarar, sangarar og tykkum,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk tit øll, sum lótu Sørvágs kirkju eina gávu.

Ein serstøk tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum,
og tykkum, sum gjørdu okkum tað so hugnaligt
at koma vestur.

*Fyri tey avvarðandi*
**Diana, Allan og Haldis**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Joen Peter Clementsen**
vanliga nevndur Petur á Sandi,

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin
30. november, 77 ára gamal.
Bønarhald verður á Lágargarði týsdagin kl. 15.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin 3. desember kl. 13.30.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kemm**

# Realskúlamynd frá 1930



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin í 1930 av realskúlanæmingum framman fyri gomlu fimleikarhøllina.

Á myndini er f.v.: Birthe Christiansen, Inger Højgaard, Jona Dal-Christiansen (Jacobsen), ókend, Ole Mitens? og ókendur.

Um onkur kennist við tey ókendu á myndini ella hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórun Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 281)

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

## 25 ára starvsdagur



Mánadagin 1. desember 2008 hevur Regin Follend, Kollafjørður, arbeitt sum verkfrøðingur hjá elfelagnum SEV í 25 ár.

**Dagurin**
**2. november. Bibiana**, deyð umleið ár 1367. Dóttir ein keisarligan embætismann, Flavianus. Tá ið tað upp, at dótturin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.

*Ein góð jólagáva*
Koyrikort?
til persónbil
10.500,- *
Tilboðið er galdandi um tilmeldað er í desember
Skeiðini byrja:
2. des - 08 kl. 17.00
7. jan - 09 kl. 17.00
*: Pakkaloysn, ið lýkur lógarásetta undirvísing
Rúni tel 21 4765
FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI
Vallalíð 3 - Tórshavn
Sjónband 357774